# Christian Høgni í superliguni

**Landsliðsmaðurin spældi síðstu tíggju minuttirnar, tá Esbjerg á heimavølli vann 2–0 á OB**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Ein føroyskur fótbóltsspælari afturat hevur strítt seg upp í donsku superliguna. Talan er um fyrrverandi NSÍ spælaran Christian Høgna Jacobsen, sum sunnudagin fyri fyrstu ferð kom á liðið hjá Esbjerg.

Tað restaðu tíggju minuttir, tá venjarin hjá Esbjerg, Viggo Jensen, setti Christian Høgna á liðið fyri Henrik Nielsen. Hesin hevði ein minutt frammanundan skorað til 2–0, sum gjørdist endaliga úrslitið.

Tað var eftir venjingina hjá besta Esbjerg hópinum leygarmorgunin, at Christian Høgni fekk boð um, at hesa ferð skuldi hann ikki spæla á seriuliðnum, men at hann skuldi sita á beinkinum á besta liðnum, sum er á triðja plássinum í superliguni.

– Christian Høgni er ein spennandi spælari, sum torir at royna frameftir. Ta løtuna, sum hann hesa ferð var á vøllinum, fekk hann ikki høvi at vísa so nógv. Verjan hjá OB var sera tøtt, men vit ivast ikki í, at vit í framtíðini kunnu fáa gagn av Christian Høgna, sigur stjórin í Esbjerg, Niels Erik Søndergaard, sum í síni tíð var ein góður miðvallari í Esbjerg.

## Á bronsukós

Fótbólturin í Esbjerg hevur rættuligan undanvind. 4.869 áskoðarar sóu teirra lið vinna 2–0 á OB, sum ikki hevði Johan B. Hansen á liðnum og á beinkinum.

Svenski Christian Karlsson, sum í summar kom til Esbjerg, setti hol á longu í 7. minutti, og so var tað, at Henrik Nielsen staðfesti.

Síðani Esberg fyrr í summar legði rygg til stórtap á heimavølli ímóti Brøndby, hevur tað bara gingið rætta vegin.

Christian Høgni Jacobsen hevur síðani summarsteðgin vant við besta Esbjerg liðnum. Hann hevur verið roknaður millum profilarnar á seriuliðnum.

At hann nú er komin á besta liðið, er ein partur av málinum, sum hann setti sær, tá Christian Høgni eftir lokna handilsskúla útbúgving á Kambsdali í summar fór til Danmarkar. Næsta málið er at gerast fastur maður á liðnum. Um tað eydnast, og Christian Høgni fer at skora mál, so er ikki óvist, at hin parturin av málinum kann gerast veruleiki. Hann er at verða seldur til okkurt stórt felag í Europa.

Christian Høgni er bara 21 árra gamal, so hann eigur nógv góð fótbóltsár á.

## Sætti í superliguni

Christian Høgni Jacobsen er fimti føroyski spælarin, sum hevur roynt seg í superliguni. Hinir spælararnir eru Jan Allan Müller og Óli Johannesen, sum hava spælt í AGF, Jákup Mikkelsen, sum í fjør vann DM við Herfølge og Todi Jónsson, sum í summar vann DM við FCK. Johan B. Hansen var í fjør fleiri ferðir á superligu liðnum hjá OB.

Superligan er bara tíggju ára gomul. Frammanundan kallaðist besta deildin í Danmark 1. deild. Tveir føroyskir fótbóltsspælarar royndu seg har. Henrik Thomsen spældi fyrst í áttati árunum við B93, og Abraham Løkin (tá var eftirnavnið Hansen) var mitt í áttati árunum á besta liðnum hjá OB.

# Jákup helt púra tætt

**Molde styrkti um fjórða plássið og er á veg í europeiskan fótbólt**

NOREG
*Jóannes Hansen*

Tað er framvegis ógreitt, um Jákup Mikkelsen fer at taka av tilboðnum, sum hann hevur um framhaldandi at spæla í Molde.

Sunnudagin var triði síðsta umfarið í tippuliguni á skránni, og Jákup Mikkelsen gjørdi góða reklamu fyri sær sjálvum. Molde var á vitjan hjá Stabæk. Einki mál fór ígjøgnum hjá føroyska landsliðsmálverjanum. Molde skoraði eina ferð, og harvið styrktu teir um sína støðu á fjórða plássinum, sum ber atgongd til UEFA Cup kappingina við sær.

Molde skoraði í 26. minutti. Bernt Hulsker var leysur, og hálvfluktaði framvið Stabæk málverjanum.

Í 2. hálvleiki trýsti heimaliðið heilt nógv. Men teir fingu ikki bóltin inn um Jákup Mikkelsen. Tættast við vóru teir, tá teir sendu fríspark í tvørtræið.

Komandi sunnudag skal Molde spæla á heimavølli ímóti Brann úr Bergen, sum leingi var við í toppinum, men sum nú er dragnað eitt sindur. Hjá Molde kom tað sunnudagin illa við, at tríggir av lyklaspælarunum fingu gult kort og verða leikbannaðir komandi sunnudag.

## Rosenborg eina ferð afturat

Í toppinum hevur Lillestrøm leingi verið stór hóttan ímóti Rosenborg, sum nógvu tey seinnu árini hevur verið suverent í Noregi. Men nú bendir alt á, at Rosenborg fer at endurvinna meistaraskapin. Tað ber ikki til at siga annað, enn at teir í Tróndheimi – vinarbýnum hjá Klaksvíkini! – eru óføri, tí teir stríðast í Europa Cup fyri meistaralið samstundis, sum teir stríðast fyri at endurvinna NM.

Í síðstu viku kom Rosenborg hópin nærri meistaraskapinum. Týskvøldið megnaði Lillestrøm bara 3–3 á heimavølli ímóti Odd, og leygardagin vann Rosenborg 2–1 á útivølli ímóti Lillestrøm.

Kurt Mørkøre er farin úr Klaksvík og aftur til Sogndal. Men hann var ikki á vøllinum sunnudagin. Sogndal, sum er komið undan øllum vanda fyri niðurflyting, hevði vitjan av botnliðnum Bryne. Sogndal var á odda 1–0 í 1. hálvleiki, men í 2. hálvleiki kiksaði tað púrasta. Bryne vann 4–1 og lyfti seg harvið burtur av tveimum teimum aftastu plássunum, sum bera beinleiðis niðurflyting við sær.

# Julian var sera eyðsýndur

**Føroyski landsliðsmaðurin tiltuskaði Hull eitt brotsspark, og ein mótstøðumaður varð rikin av vøllinum fyri at hevna seg ímóti Juliani**

ONGLAND
*Jóannes Hansen*

Hull City styrkti leygardagin um sína støðu á næstfremsta plássinum. Teir vunnu á heimavølli 1–0 ímóti Torquay, men tað var tepurt. Einasta málið kom í 73. minutti. Tað skoraði írin Michael Reddy. Hann var akkurát komin á vøllin. Tá hann setti fótin undir innleggið úr høgru var tað bara onnur ferðin, at hann takti bóltin.

Undan steðginum var tað sera órudduligt og lítið samanhangandi. Men eftir hvíldina fekk Hull betri tak á spælinum, og teir vóru leikliga greitt omaná. Besta møguleikan fingu teir við brotssparki, men skotið hjá Kevin Dearden var so mikið jánkasligt, at málverjin ikki hevði trupulleikar at verja fyri.

Julian Johnsson var á Hull miðvøllinum allar 90 minuttirnar, og hann var rættuliga eyðsýndur. Tá dómarin bríkslaði fyri brotssparki, var tað tí, at Julian, sum var komin úr høgru og inn í brotsteigin við bóltinum, varð feldur.

Síðstu løtuna royndu gestirnir at javna. Teir komu ikki til serligar møguleikar, og tað mundi vera ábending um máttloysi, tá Gary Brabin í síðstu løtu fekk reyða kortið. Tað fekk hann fyri at smekka ælbogan í andlitið á Juliani Johnsson.

# Málleyst og samstundis undirhaldandi

**Brøndby og AaB vóru partar í sera undirhaldandi toppdysti, har bara málini restaðu**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Málini eru mest týðandi parturin av undirhaldinum í fótbólti, er ofta at hoyra. Sjálvandi er tað rætt, at málini eru krúnan á fótbóltsundirhaldinum. Men at tað væl ber til at vera vitni til gott fótbóltsundirhald, sjálvt um málini ikki eru har, var sunnudagin eitt gott dømi um í superliguni.

21.025 áskoðarar vóru í Brøndby seinnapartin sunnudagin. Toppdysturin millum Brøndby og AaB endaði málleysur, men tað var sera lívligt og undirhaldandi.

AaB var omaná í 1. hálvleiki, og eftir steðgin var heimaliðið omaná. Fleiri upplagdir málmøguleikar vóru. Tann største fekk toppskjúttin hjá AaB, Indrek Zelinski. Hann var púra blankur fyri málinum, tá flatt innlegg kom úr høgru. Men ólukkutíð fyri toppskjúttan og AaB, so rakti hann bóltin so mikið skeivt, at bólturin úr fýra metrum og púra opnum máli fór omanfyri tvørtræið.

## Eingin Todi

FCK var í Silkeborg. Todi Jónsson og Heine Fernandez restaðu, tí teir framvegis eru skaddir. Tað er ivasamt, um tað fer at eydnast álopsmonnunum at verða tøkir, tá FCK hóskvøldið á heimavølli fer at spæla í UEFA Cup ímóti Ajax úr Amsterdam.

Í Silkeborg stóð nógv á hjá FCK. Teir spældu við tíggju monnum í ein tíma. Thomas Røll, sum í summar kom frá Silkeborg, varð rikin av vøllinum fyri býttisliga hevnisøku. Kortini eydnaðist tað FCK at fáa øll stigini. Teir vunnu 1–0, og tað var Zuma, sum í 73. minutti skoraði málið. Talan var um hornaspark, sum varð snittað til handara stólpan.

FCK arnir vóru hepnir at fáa øll stigini. Ikki tí teir ikki spældu eins væl og betri enn Silkeborg, men tí teir hóast alt vóru tíggju á vøllinum største partin av tíðini. Tíggju minuttir eftir at Thomas Røll varð rikin av vøllinum átti FCK málverjin, Magnus Kihlstedt, at sæð reytt. Hann rendi inn í mótstøðumenn, sum var leysur uttanfyri brotsteigin, men dómarin metti, at talan var ikki um meiri enn brot, sum skuldi sektast við gula kortinum.

## Lyngby farið í fisk

Higartil hevur tað eydnast Lyngby venjaranum og spælarunum at spæla væl og stríðast, sjálvt um tað stendur sera illa til fíggjarliga. Felagið er um at fara av knóranum, og tað er óvist, hvar heimavøllurin hjá Lyngby skal vera í framtíðini.

Men hesa ferð gekk illa. FCM fór til hús við øllum. Eftir lítlum hálvum tíma hevði Morten Skoubo skorað trý mál, og FCM vann 4–1.

AGF spældi ikki so galið, men tað var um reppið, at teir taptu á heimavølli ímóti AB. Fimm minuttir undan leikloki eydnaðist tað AGF at javna til 1–1.

I gjárkvøldið skuldu Viborg og Vejle spæla síðsta dystin í hesum umfarinum.



# Favorittsigrar í 1. deild

**Klaksvíkingar og vestmenningar vunnu stórsigar meðan meistaraliðið úr Havnini skuffaði við teprum sigri**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Vestmenningar byrjaði við einum sonnum braki tá teir vunnu 4-0 á einum sera skerdum kollfjarðaliði í fyrsta umfarinum av liðkappingini. Unglingurin Eyðálvur Johannesen, sum ikki hevur telvað nógv seinastu tvey árini, hevði IM John Rødgaard yvir av sær á fyrsta borði, og varð tað ein ov stór uppgáva hjá unga kollfirðinginum. Torbjørn Thomsen, John Jacobsen og Kári Durhuus mannaðu hini borðini hjá vestmenningum, og talan er tí um eitt sterkt lið sum hevur heilt góðar møguleikar í ár.

Hans Kristian Simonsen sum vanliga situr á fyrsta borði hjá kollfirðingum, fer til Spania at telva HM fyri ungdómar undir 18 ár. Eisini umboðar Miriam Olsen Føroyar í bólkinum undir 14 ár. Telvað verður í døgunum 20. okt — 4. nov.

Í Havn dystaðust HT 1 og HT 2 móti hvørjum øðrum. Hetta er fyrstu ferð Havnar Telvingarfelag hevur tvey lið í fremstu deildini. HT2 góvu favorittunum harða mótstøðu og stjólu loksins hálvtannað stig frá teimum.

Martin Poulsen — fyrsta borði hjá HT1 - vann eftir bert fimtan leikum tá Jóhan Gaard bukkaði ein mann burtur. Olaf Berg megnaði ikki at knekka Óla Joensen, og mátti taka til takkar við hálvum stigi, meðan Herluf Hansen hinvegin vann trygt sítt talv á triðja borði á Johan E. Hansen. Jógvan Næs á HT2, vann eitt spennandi talv ímóti Andrias Ziska. Andrias leyp á við kongagambittinum, offraði fyri eitt álop, sum tó vísti seg ikki at vera nóg gott.

Sostatt ein góð byrjan hjá lítla havnarliðnum, og heldur skuffandi byrjan hjá meistaraliðnum frá í fjør.

## Hvalvíkingar iðra seg

Mest spennandi dysturin í fyrstu deild var í Hvalvík, har klaksvíkingar vitjaðu. Steintór Rasmussen var ikki við í ferðalagnum og tí vórðu boð send eftir Mr. KTF, Petur Hans Poulsen.

Ólavur Simonsen hevði hvíta fólkið ímóti Martin Brekká á fyrsta borði, men rakk tað bert til ein javnleik. Ólavur offraði fyri álop, men var í roynd og veru heppin at fáa javnt. Rani Nolsøe - sum í mong ár sat á fyrsta borði — megnaði sína fyrstu uppgávu á øðrum borði til fulnar tá hann vann á Finnbjørn Zachariassen eftir at hava staðið nógv verri í miðspælinum. Finnbjørn fann ikki vinnandi leikin og eftir tað brast múrur hansara saman.

Á triðja borði vann Tummas Martin Anthoniussen heldur heppið á Sámal Christiansen, meðan Petur Hans leikti javnt ímóti Bergur Magnussen. Ein góður sigur hjá klaksvíkingar, sum uttan iva hava allar møguleikarnar at enda á ovastu rók. Hvalvíkingar muga iðra seg eftirsum teir saktans kundu vunnið hendan dyst.

Eftir eitt umfar er sjálvsagt ógjørligt at meta um komandi leikgongdina í fremstu deildini. At siga at klaksvíkingar verða ringir at syfta, er tó ikki at fara heilt skeivur.

## 2. deild — favorittarnir vunnu

Sandavágsmenn við Torkil Nielsen á fyrsta borði, vunnu stórsigur 3,5-0,5 á gøtumonnum um vikuskiftið. Favorittarnir svíktu ikki. Reinhold Isaksen bjargaði gøtumonnum hálva stigið ímóti Gutta Petersen.

Runavíkingar og vestmenningar býttu stigini, meðan toftamenn við bert trimum monnum og uttan Jens Kristian Hansen, vunnu 2,5-1,5 á klaksvíkingum. Teir fáa tó bert 1,5 stig fyri stríðið. Eitt straffstig verður nevnliga tikið frá teimum eftirsum teir bert møttu við trimum telvarum.

Í 3. deild verða teir úr HT 3 ringir at basa. Við monnum sum Súna Ziska á liðnum sær kappingarárið hjá teimum ljóst út, og fer HT allarhelst at hava umboðan aftur í 2. deild næsta ár. HT 3 vann 3-1 á HT 4.

VT og KT býttu stigini, men eisini í hesum dysti missur KT eitt stig tá teir bert møttu við trimum telvarum. Sandavágsmenn við feðgunum Magna Thomassen og fyrrverandi landsliðsleikaranum í fótbólti, Ari Thomassen, taptu teirra dyst ímóti Róki. Feðgarnir fingu stigini hjá heimaliðnum; Magni leikti javnt og Ari vann.

## FM í útisetu

Eins og undanfarin ár verður útisetaføroyameistarin funnin í føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn. Átta telvarar royna seg, har allir telva ímóti hvørjum øðrum.

Tvey umfør eru leikt, og ikki óvæntað hevur fimmfaldaði føroyameistarin Heini Olsen fult stigatal. Hetta hevur Finnbjørn Vang eisini megnað, eitt nú við at vinna á Terja Petersen, sum saman við Carl Eli N. Samuelsen, Pól Martin Hansen og Regin Reinert hava eitt stig. Aftastir eru Ian Leyni og Dannie Nielsen við ongum stigi.

Tíverri kundu flestu av hinum fremstu telvarnum í felagnum ikki luttaka á hesum sinni. Talvið hesa vikuna er millum Carl Eli og Heina úr fyrsta umfarinum.

## Flóvin á ferð

Fyri tveimum árum síðani tók Flóvin Tór Næs ta stóru avgerð at telva kring Evropa burturav í eitt ár. Hann fekk í hesari drúgvu talvferð nógvar royndir, umframt kontaktir sum gera tað lættari hjá honum at finna góðar kappingar. Eisini verður hann bjóðaður til ymsar kappingar. Hann er í løtuni í lestrarørindum á flatlondum, men forðar tað ikki fyri framhaldandi talvaktiviteti kring miðevropa.

Flóvin luttekur í hesum døgum í sterkari opnari kapping í Hollandi, tiltikna Hoogeveen kappingin. Hann er styrkismettur sum nummar 32 av 46 telvarum. Illa hevur gingist í hond hjá Flóvini, tí eftir fyrstu trimum umførunum hevur hann enn fyrsta stigið til góðar. Fyrsta talvið tapti Flóvin á einum russiskum stórmeistara. Kappingin fevnir um níggju umfør.

## Talvið hesa vikuna

**Carl Eli N. Samuelsen — Heini Olsen FM í útisetu (1)**

**Nimzoindiskt**
1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.Fc2 c5 5.e3 Ric6 6.Rif3 0-0 7.Bd3 (Hvítur blandar variantar saman, sum ger at svartur útjavnar) 7...d5 8.cxd5 exd5 9.a3 cxd4 10.Rixd4 Rixd4 11.exd4 Re8+ 12.Be3 Bd6 (Svartur hevur minst javnt spæl) 13.h3 Bf4! (Hvítur má nú leika passivt) 14.Rid1 Fd6 15.0-0 Rie4 16.Bxf4 Fxf4 17.Bxe4 dxe4 [17...Rxe4? 18.Ric3] 18.Re1 Bf5 19.Rie3 Rad8 (Offrar finnu fyri álop) 20.Fc5 Be6 21.Fxa7 Rd6 22.Kf1



Bxh3! (Áhugavert offur, sum tó ikki sikkurt vinnur) 23.gxh3 Ff3 24.Fa4 Red8 25.Rig2? [25.Fa5! hesin leikur bjargar helst hvítu støðuna] 25...Rg6 26.Re3 (Riddarin verður mótoffraður, men til fánýtis. Sigast skal tó at hvítur var í svárari tíðarneyð) 26...Fxg2+ 27.Ke2 Rf6 28.Rf1 Rf3 29.Fa5 [29.Rxe4 Rxf2+ 30.Rxf2 Fxe4+ 31.Kf1 Re8] 29...Rc8 30.Fd2 f5 (Panikkur, men støðan er tó tapt kortini) 31.Rc3 Rfxc3 32.bxc3 Ff3+ 33.Ke1 Rxc3 0-1

# Liðkappingin 2001/2002 - 1. umfar

**1. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| **HT** | **HT 2** | **2.5-1.5** |
| Martin Poulsen (2085) | Jóhan Gaard (1835) | 1-0 |
| Olaf Berg (2040) | Óli Joensen (1790) | 0.5-0.5 |
| Herluf Hansen (2035) | Jóhan E. Hansen (1730) | 1-0 |
| Andrias Ziska (1955) | Jógvan Næs (1715) | 0-1 |
| **TFS** | **KTF** | **1-3** |
| Martin Brekká (2070) | Ólavur Simonsen (2235) | 0.5-0.5 |
| Finnbjørn Zachiasen (2050) | Rani Nolsøe (2185) | 0-1 |
| Sámal Christiansen (1850) | Tummas M. Antoniussen (1965) | 0-1 |
| Bergur Magnussen (1735) | Petur H. Poulsen (1795) | 0.5-0.5 |
| **KT** | **VT** | **0-4** |
| Eyðálvur Johannesen (1640) | IM John Rødgaard (2315) | 0-1 |
| Karl L. Johansen (1680) | Torbjørn Thomsen (2210) | 0-1 |
| Alvin Joensen (1640) | John Jacobsen (1910) | 0-1 |
| Árant Djurhuus (1175) | Kári Durhuus (1755) | 0-1 |

**Støðan eftir 1. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. VT, Vestmanna | 1-0-0 | 0 | 4,0 |
| 2. KTF, Klaksvík | 1-0-0 | 0 | 3,0 |
| 3. HT, Tórshavn | 1-0-0 | 0 | 2.5 |
| 4. HT 2, Tórshavn | 0-0-1 | 0 | 1.5 |
| 5. TFS, Hvalvík | 0-0-1 | 0 | 1,0 |
| 6. KT, Kollafjørður | 0-0-1 | 0 | 0,0 |

**2. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| **VT 2** | **RT** | **2-2** |
| Jákup á R. Andreasen (1655) | Bjarki Ziska (1805) | 0.5-0.5 |
| Jón Mikkelsen (1655) | Brandur K. Jacobsen (1665) | 0.5-0.5 |
| Jóan Pauli Johannesen (1465) | Henrik W. Joensen | 1-0 |
| Ingolf Debes (1220) | Eyðun Lamhauge (1625) | 0-1 |
| **TT** | **KTF 2** | **2.5-1.5** |
| Helgi Joensen (1740) | Vagn Heldarskarð (1605) | 1-0 |
| Wensil Højgaard (1730) | Jan Simonsen (1315) | 0.5-0.5 |
| Justines Hansen (1650) | Ebbe Petersen (1215) | 1-0 |
| - Rani Tómasson (1145) | 0-1 | |
| **ST** | **GT** | **3.5-0.5** |
| Torkil Nielsen (2080) | John Joensen (1750) | 1-0 |
| Bernhard Augustinussen (1835) | Jákup F. Joensen (1715) | 1-0 |
| Gutti Petersen (1630) | Reinhold Isaksen (1710) | 0.5-0.5 |
| Sonni Nielsen (1745) | Heri Thomsen (1375) | 1-0 |

**Støðan eftir 1. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. ST, Sandavágur | 1-0-0 | 0 | 3.5 |
| 2. RT, Runavík | 0-1-0 | 0 | 2,0 |
| 3. VT 2, Vestmanna | 0-1-0 | 0 | 2,0 |
| 4. TT, Toftir | 1-0-0 | -1 | 1.5 |
| 5. KTF 2, Klaksvík | 0-0-1 | 0 | 1.5 |
| 6. GT, Gøta | 0-0-1 | 0 | 0.5 |

**3. Deild**

| | | |
|---|---|---|
| **ST 2** | **Rókur** | **1.5-2.5** |
| Magni Thomassen (1495) | Karl M. S. Jensen (1315) | 0.5-0.5 |
| Ari Thomassen | Hans E. S. Jensen (1225) | 1-0 |
| Allan Eldevig | Bergur Johannesen (1355) | 0-1 |
| Rúni Jacobsen | Dánjal P. Olsen (1380) | 0-1 |
| **KT 2** | **VT 3** | **2-2** |
| Niclas M. Joensen (1725) | Jógvan Egholm (1300) | 1-0 |
| Hans Petur Joensen (1655) | Rógvi Hansen (1075) | 1-0 |
| Hans Martin Andreasen (1305) | Bárður Joensen | 0-1 |
| - Finnur Johannesen | 0-1 | |
| **HT 3** | **HT 4** | **3-1** |
| Suni Ziska (1765) | Poul Poulsen (1720) | 1-0 |
| Jákup A. Jensen (1625) | Herluf Mortensen (1325) | 0-1 |
| Jón Andreasen (1610) | Andrias Jacobsen (1280) | 1-0 |
| Ronny í Lon (1440) | Rógvi Mortensen (1120) | 1-0 |

**Støðan eftir 1. umfar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. HT 3, Tórshavn | 1-0-0 | 0 | 3,0 |
| 2. Rókur, Oyri | 1-0-0 | 0 | 2.5 |
| 3. VT 3, Vestmanna | 0-1-0 | 0 | 2,0 |
| 4. ST 2, Sandavágur | 0-0-1 | 0 | 1.5 |
| 5. KT 2, Kollafjørður | 0-1-0 | -1 | 1,0 |
| 6. HT 4, Tórshavn | 0-0-1 | 0 | 1,0 |